

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 04 - 2013

# Maersk flyta uranmálm úr Grønlandi í konteynarum

Áhugi er eftir øllum at døma fyri at fara undir at útvinna uranmálm í Grønlandi, men hesum hava fleiri danskir politikarar mælt frá og vísa til, at avgerðin um hetta liggur ikki í Grønlandi men í Danmark. Herfyri var fundur millum danska forsætisráðharran og nýggja grønlenska landsstýrisformannin um málið. Eftir fundin segði danski forsætisráðharrin, at Danmark fer ikki at leggja forðingar fyri, um Grønland ætlar at fara undir urannámsvinnu. Grønland ynskir at siga seta úr gildi sokallaða nulltoleransuprinsippið um útvinning av ráevnum við radioaktivum innihaldi, sum Danmark hevur skrivað undir at fylgja.  Vit hava avgjørt at fylgja grønlendsku ynskjunum og hava sett eina arbeiðsbólk at hyggja at málinum og teimum spurningin hetta kann reisa, sigur danski forsætisráðharrin. Í kjalarvørrinum á hesi gongd er danska reiðaríið Maersk Line nú farið at fyrireika seg uppá eina gongd í Grønlandi við uran námsvinnu. Maerk ætlar at flyta uranmálm frá námum í Grønlandi í konteynarum. Eisini er talan um at flyta zink í konteynarum. Tað er australska námsfelagið Greenland Minerals and Energy, sum hevur vent sær til reiðaríið. Vit hava tikið upp samráðingar við námsfelagið um, at vit frá 2017 kunnu vera klárir at sigla við uranmálmi í okkara konteynarum, nakað vit ongantíð hava roynt áður, sigur Kristian Juhl Nymand, stjóri fyri virkseminum hjá Maersk Line í Danmark við Berlingske Tidende. Ætlanin hjá australska felagnum er at framleiða tríggjar millionnir tons av málmi um árið, sum svarar til ein umsetning uppá 2 milliardir krónur.